## Sámal heldur fram í GÍ/LÍF

Á heimasíðu sínari boðar GÍ/LÍF frá, at teir hava longt sáttmálan við fýra av spælarunum, sum í ár hava verið í Formula-hópinum. Millum hesar fýra er liðformaðurin, Sámal Joensen, í mong ár hevur verið roknaður millum stóru profilarnar í føroyskum fótbólti. Hinir tríggir eru Áslakkur R. Petersen, Niclas Niclassen og Jan Poulsen. Áslakkur og Niclas hava støðugt verið millum teir fyrstu ellivu á vøllinum, meðan Jan Poulsen er ein av ungu spælarunum, sum roynir at bíta seg fastan á liðnum.




## Stjørnan er víðari

StÍF og Stjørnan spældu í gjár fjórðingsfinalu í Coca-Cola kappingini í hondbólti. Og sum væntað gjørdist tað Stjørnan, sum vann seg í hálvfinaluna. Hetta við tryggum 30-18 sigri. Dysturin varð mest sum avgjørdur fyri steðgin, tá Stjørnan vann seg upp á 14-6, og so gjørdist seinni hálvleikur at kalla avgreiðsluspurningur. Besti málskjúttin hjá Stjørnuni var Simona Petersen við 10 málum. Rebekka Justinussen skeyt 6 av málunum hjá StÍF.

# Vágabrak og oddastríð

**Á Giljanesi verður eitt ordans brak av einum dysti, tá unga oddaliði SÍ skulu á vitjan hjá Drátti í bestu kvinnudeildini. Hjá monnunum verður eisini ein sera spennandi dystur í Klaksvík, tá bæði oddaliðini bresta saman**

FLOGBÓLTUR

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið verður sera spennandi uppgerð í meistaradeildini hjá kvinnum, tá Dráttur tekur móti SÍ, ið kappast við ÍF um plássið í oddinum.

Spurningurin hesaferð er tí, um SÍ kann halda góðu gongdini, ella um Dráttur hinvegin kann arga grannarnar og klára at økja um spenningin aftur.

Hjá SÍ verður óivað vónað at unga liðið vísir mentala, eins væl og kroppsliga styrki, tá tær fara á vitjan hjá grannunum úr Drátti. Hinvegin ætla Drátturskvinnur sær óivað at smasja seg inn í oddin aftur, har tað er so spennandi at spæla.

### SÍ í tveimum oddabrakum

Er tað talan um oddabrak í meistaradeildini hjá kvinnum, er tað ikki minni so, hjá monnunum.

Klaksvík verður karmur um satt oddabrak, tá SÍ liðið kemur á vitjan. SÍ eru serstakliga vælspælandi í løtuni, og tað eru Mjølnir eisini, so fólk kunnu vænta sær einn sannan góðbita av flogbólti á hægsta støði. Nýggju hallarviðurskiftini í Klaksvík fara óivað eisini at koma til sín rætt, hetta vikuskiftið, tá tey eru karmur um eitt ordans oddabrak.

Spurningurin er so, um ÍF kunnu gera sær dælt av hesum oddabrakinum í Klaksvík.

ÍF skulu í vikuskiftinum tveir túrar til Havnar. Leygardagin skulu teir møta Fleyr og sunnudagin spæla teir ein dyst, ið hevur ligið á láni, í longri tíð. Tað er dysturin móti Fram.

Vinnur ÍF báðar sínar dystir, og SÍ lútar móti Mjølni, so eru Fuglfirðingar tvey stig aftanvert SÍ, men við einum dysti til góðar, í mun til SÍ. Skuldi tað hinvegin hent seg, at SÍ vinnur í Klaksvík, kunnu ÍF leggja seg ájavnt Mjølnir á øðrum plássi. Men høvuðsendamálið hjá ÍF má í fyrsta lagið vera, at teir konsentrera seg til fulnar í sínum dystum, og ikki, hvat fyriferst aðrastaðni.

Hvussu er og ikki, so fáa vit enn eitt spennandi vikuskifti við einari rúgvu av flogbólti á høgsta støði.



*Oddadystur er í Klaksvík, har Mjølnir tekur móti SÍ*

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 8 | 7 | - | 1 | 23 | 6 | 17 | 14 |
| 2 | ÍF | 7 | 6 | - | 1 | 18 | 8 | 10 | 12 |
| 3 | Dráttur | 8 | 6 | - | 2 | 19 | 11 | 8 | 12 |
| 4 | KÍF | 8 | 4 | - | 4 | 17 | 14 | 3 | 8 |
| 5 | Mjølnir | 8 | 2 | - | 6 | 11 | 19 | -8 | 4 |
| 6 | TB | 8 | 2 | - | 6 | 8 | 18 | -10 | 4 |
| 7 | Fleyr | 7 | 0 | - | 7 | 1 | 21 | -20 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 7 | 6 | - | 1 | 20 | 8 | 12 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 6 | 5 | - | 1 | 16 | 4 | 12 | 10 |
| 3 | ÍF | 5 | 3 | - | 2 | 11 | 10 | 1 | 6 |
| 4 | Fram | 6 | 1 | - | 5 | 6 | 15 | -9 | 2 |
| 5 | Fleyr | 6 | 0 | - | 6 | 2 | 18 | -16 | 0 |

## Laudrup vann á AaB

**Getafe skoraði tíðliga í dystinum, og so høvdu teir fyri tað mesta tamarhald móti einum væl stríðandi AaB-liði**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jón Rói Jacobsen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, tá AaB í gjárkvøldið tók ímóti spansk Getafe, har Michael Laudrup er venjari.

AaB byrjaði dystin væl, men eftr bara 10 minuttum fekk Getafe mál eftir sera vakurt kontra-álop.

Málið, sum Pablo Hernandez setti inn við bringuni, gav gestunum betri tamarhald á støðuni, og síðani spældu teir fyri tað nógva kontra.

Eitt korter fyri leiklok punkteraði Estaban Granero dystin, tá hann hegnisliga sendi bóltin í netið, og so munaði tað lítið, at Rade Prica í yvirtíðini minkaði um munin.

## Blokhin gevst sum landsliðsvenjari

**Oleg Blokhin, sum var venjari hjá Ukraina, tá teir spældu móti Føroyum í seinastu EM-undankappingini, hevur nú sagt seg úr starvinum**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Eftir at hava staðið á odda fyri landsliðnum í fýra ár, haldi eg meg ikki hava meira at geva. Og eg gevi bert mær sjálvum skuldina fyri, at vit ikki megnaðu at spæla okkum til EM-endaspælið sigur Blokhin við tíðindastovuna ESPN.

55 ára gamli Blokhin varð í 1975 kosin sum besti spælarin í Europa. Hann gjørdist landsliðsvenjari í 2003, og í 2006 leiddi hann landið til fjórðingsfinaluna í HM. Tað er besta úrslitið hjá landinum nakrantíð.

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 235 | 175 | 60 | 14 |
| 2 | Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 181 | 150 | 31 | 10 |
| 3 | VB | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 156 | 143 | 13 | 9 |
| 4 | Kyndil | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 200 | 229 | -29 | 7 |
| 5 | VÍF | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 180 | 223 | -43 | 5 |
| 6 | StÍF | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 173 | 205 | -32 | 3 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 9 | 6 | - | 1 | - | 2 | 255 | 218 | 37 | 13 |
| 2 | Neistin | 9 | 6 | - | 1 | - | 2 | 255 | 235 | 20 | 13 |
| 3 | H71 | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 230 | 227 | 3 | 10 |
| 4 | VÍF | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 253 | 256 | -3 | 9 |
| 5 | Kyndil | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 220 | 249 | -29 | 6 |
| 6 | KÍF | 9 | 1 | - | 1 | - | 7 | 222 | 250 | -28 | 3 |